Dimmalætting

– ÁLÍTANDI TÍÐINDI

Hósdagur

21. oktober 1999

Nr. 199

122. árgangur

Kr. 10,00

Jørgin verjir loyvini

Sambært Jørgin Niclasen hevur Krúnan við Svend Aage Ellefsen ikki fingið nakrar sersømdir frá landsstýrinum, hóast fleiri ivamál eru um samansetingina av loyvinum

Heimatíðindi 3

Kalvastøðin verður klár næsta vár

Tað nærkast nú veruleikanum, tá ið kalvaaling kann byrja í Føroyum. Kalvastøðin í Nesvík er komin so mikið væl áleiðis, at næsta vár verður strokið. Tað kann tó ganga long tíð, áðrenn vinnuligt virksemi spyrst burturúr

Heimatíðindi 4



Habibie koyrdur frá

Indonesiski forsetin Habibie stillaði ikki upp aftur, av tí at loggevandi valdið ikki hevur álit á honum, og tí tók hann seg aftur, og lat ein nýggjan sleppa framat í staðin

Útlond 8

Landsynningureystan, 8-13 m/s; í støðum 15 m/s. Hálvskyggjað ella skyggjað og yvirhøvur turt. Hitin 8-10 stig.

Gravgangur eftir oljunøvnum

Í Dimmalætting í gjár stóð at lesa undir skrásetingum, at eitt smápartafelag, sum rópar seg Sp/f Faroe Group Ltd., hevur fingið sær 25 nýggj hjánøvn. Flestu nøvnini hava okkurt við olju at gera, og spurningurin er, hví tað er neyðugt við so nógvum hjánøvnum. Kristin Balle frá Skráseting Føroya sigur, at tað ikki er uppgávan hjá skrásetingini at viðgera umsóknir um viðtøkubroytingar út frá øðrum krøvum enn teimum, sum eru galdandi skrásetingarlóg, og einki hámark er fyri mongdini av hjánøvnum

LEIF LAADAL

Um tú ætlar tær inn í eina komandi føroyska oljuvinnu og skal skráseta eitt partafelag, so er tað nú eitt sindur torførari at finna eitt navn til felag títt. Í gjár boðaði Skráseting Føroya frá, at smápartafelagið Faroe Group hevur fingið sær 25 nýggj hjánøvn. Nærum øll tey nýggju hjánøvnini hava eitt hvørt við oljuvinnu at gera. Eitt nú ber ikki til at stovna eitt partafelag, sum eitur Faroe Oil Group. Faroe Oil Drilling, Atlantic Oil og Faroe Oil Suply eru eisini farin saman við sum sagt 21 øðrum nøvnum av hesum slag.

Tað bar ikki til at fáa eina viðmerking frá Faroe Group í gjár, so orsøkina til hesa navna-hamstring vita vit ikki, men hjá Skráseting Føroya siga tey, at teirra uppgáva ikki er at føra justits við, hvørji hjánøvn eitt partafelag ognar sær.

– Følir eitt partafelag harafturímóti, at eitt av teimum 25 nøvnunum, sum Faroe Group hevur skrásett sum hjánavn, líkist ov nógv teirra navni, so kann málið avgerast við dómstólarnar, sigur Kristin Balle, sum leggur afturat, at Skrásetingin bert kannar, um eitt navn er skrásett frammanundan.

Tað vil altso siga, at eitt navn, sum líkist rættiliga nógv einum verandi navni, kann blíva skrásett. Uppgávan hjá Skrásetingini er ikki at meta, um hetta navn liggur ov tætt upp at einum verandi navni; bert at tryggja, at nágreiniliga navnið ikki verður endurtikið.

Tað er ikki óvanligt, at eitt partafelag skrásetur nøkur hjánøvn. Til dømis skrásetti Føroya Tele herfyri tey nøvn, sum líkjast teirra - eitt nú Tele Føroyar. Faroe Group hevur skrásett 25 hjánøvn, og nógv av teimum hava sum so einki við Faroe Group at gera.

Tað kann hugsast, at Faroe Group hevur ætlanir um at selja nøvnini, um nakar hevur áhuga í at keypa, men Wilhelm Petersen, stjóri hjá Atlants Kolvetni, heldur ikki, at fólk, sum hava áhuga í eini komandi føroyskari oljuvinnu, vilja láta pening fyri eitt oljunavn.

– Tað er ikki sjálvt navnið, sum gevur einum felag innihald, men innihaldið, sum ger, at felagið er eitt navn, sigur ein av teimum higartil fáu føroyingum, sum arbeiðir við olju burturav í Føroyum.

Faroe Group hevur ikki gjørt nakað skeivt í hesum førum, tað kunnu vit slaa fast, men í framtíðini verða oljuáhugaðir føroyingar nú noyddir at leggja høvdið enn meiri í bløt, fyri at finna eitt navn til felag sitt.

Fullveldi er framtíðin

Fólkið hevur hug at skjóta fullveldi út í framtíðina. Sambært kanningini hjá útvarpinum ynskja tríggir av hvørjum fýra veljarum, at Føroyar einaferð í framtíðini gerast sjálvstøðug tjóð uttan fyri ríkisfelagsskapin. Men fyri fyrst skal framtíðar støða Føroya vera skipað innan fyri ríkisfelagsskapin, siga 60 prosent samstundis.

Løgmaður ásannar, at fólk óttast fyri vælferðini. Høgni Hoydal heldur einki skurr vera í samgonguni um sjálvstýrisspurningin.

Lesið á síðu 3

Sat fastur í lyftu í 40 tímar

Ein maður í New York sat síðsta vikuskiftið fastur í eini lyftu í samfullar 40 tímar, uttan at nakar hoyrdi hansara róp um hjálp, skriva bløð í USA.

Tann 32 ára gamli maðurin, sum eitur Nicholas White, fór av skrivstovuni hjá sær fríggjakvøldið umleið klokkan hálvgum tólv á veg til hús, men lyftan steðgaði beint omanfyri 13. hædd.

White rópti og trýsti á allar knøttarnar fyri at fáa onkran at hjálpa sær, men eingin kom. 40 tímar seinni kom hjálpin, tá ein vaktur sá hann í einum vaktarupptøkutóli.

Neyðars maðurin fekk hvørki vátt ella turt teir 40 tímarnar, hann sat fastur í lyftini.

Fólk í húsinum duga ikki at siga, hvussu tað bar til, at White skuldi sita so leingi, uttan at nakar varnaðist hann.

Steinprent til útflutnings

Grafiski verkstaðurin í Listaskálanum hevur fingið nýggjan dagligan leiðara og eitt nýtt starvsfólk. Verkstaðurin er í dag á hædd við líknandi verkstaðir í útlondum, og ætlanin er eisini at fáa listafólk uttanífrá hendanvegin

LEIF LAADAL

Fyri at gera uppruna steinprent, er neyðugt við eini góðari pressu. Á verkstaðnum í Listaskálanum hava tey tríggjar av slagnum, og verkstaðurin er í dag so væl útgjørdur, at ætlanin er at siga listafólkum úr øllum Norðurlondum og aðrastaðni í heiminum frá møguleikunum í Føroyum.

Nýggi dagligi leiðarin, litografurin Jan Anderson, sum hevur hollar royndir innan listprent, ivast heldur ikki í, at útlendsk listafólk fara at koma hendan vegin:

– Nógv hava longu verið í Føroyum og arbeitt, men eg ivist ikki í, at rættilig gongd kemur á, nú verkstaðurin hevur fingið fasta manning, sum kann hjálpa listafólkunum við tí praktiska.

Lesið á síðu 5